**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Heimarøktin*

# Húsavørður

**Søkt verður eftir húsavørði til Røktarheimið á Mørkini á Streymnesi at byrja 1. mars ella skjótast tilber**

Røktarheimið á Mørkini er nýggjur bygningur sum væntandi verður tikin í brúk í mars mánaða 2006.

Á heiminum er pláss fyri 32 búfólkum, sum koma at búleikast í fýra eindum við átta búfólkum á hvørjari eind.

Heimið er partur av Heimarøktini øki 2 við tilvísing til økisleiðaran. Heimið er bygt út frá einum grundleggjandi tanka um eitt so heimligt og aktivt umhvørvi sum møguligt.

**Arbeiðsuppgávur eru m.a.:**
- Vanligt viðlíkahald av bygninginum, útbúnaði og økinum uttanum
- Tryggja at el, vatn, hiti og sanitetsviðurskiftini eru í lagi
- Tryggja at eldsløkkiskipanin er í lagi
- Portørtænasta inni í heiminum
- Køkshjálpitænasta

**Vit vænta av tær, at tú:**
- hevur handverkaraútbúgving
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- dugir væl at samstarva og samskifta við onnur
- ert røkin
- hevur koyrikort

**Vit kunnu bjóða:**
- Góðan møguleika til at brúka tíni skapandi evni
- Góða innleiðslu og neyðug skeið til at røkja teknisku útbúnaðin
- Eitt heimligt og hugnaligt umhvørvi, har hvør einstakur kennir seg væl

**Setanarviðurskifti:**
Starvið er fulltíðarstarv og verður at seta 01. mars 2006 ella skjótast til ber. Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Setanarøkið fevnir um Heimarøktina og Serforsorgina við setanarstaði í Heimarøktini. Tænastustaðurin er fyribils Heimarøktin Vágoy/Norðstreymoy.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sonju Klein, økisleiðara tlf. 333249/282249.

Umsókn saman við prógvi, og møguligum viðmælum verður at senda til :

**Heimarøktin Vágoy/Norðstreymoy**
Stílað: Sonja Klein, økisleiðari
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist: 21. februar 2006**

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Serstovnadeildin*

# Pedagogur

## til Sambýlini á Mýrini

Innan Almanna- og heilsumálaráðið og stovnum undir tí, við fyribils tænastu á Sambýlunum á Mýrini 4-6 í Hoyvík, er 1 pedagogstarv leyst at søkja til setan 1. mars 2006 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um eitt fulltíðarstarv, og er arbeiðstíðin 40 tímar um vikuna.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

Sambýlini á Mýrini eru heim hjá 10 vaksnum menningartarnaðum búfólkum.

Arbeiðið fevnir millum annað um at vegleiða búfólki í øllum tí, sum tey hava tørv á. At menna hvønn einstakan til at húsast saman í felagsskapi. At skapa trivna og á ein pedagogiskan hátt tryggja búfólkinum menningarmøguleikar og saman við teimum finna útav, hvussu innihaldið í gerandisdegnum skal virka.

Dentur verður lagdur á, at tann ið sett/ur verður, hevur evni og vilja at samstarva og samskifta við okkara avvarðandi og starvsfelagar, er sjálvstøðug/ur, likamliga og sálarliga væl fyri, fleksibul, kreativ/ur, dámar væl avbjóðingar, er ágrýtin og opin fyri nýhugsan.

**Løn- og setanartreytir:**
Starvið er tænastumannastarv, sett sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið og lønt stigini, 24, 25, 27, 28 og 30 til 33.

Nærri fæst at vita um størvini frá Hans E. Fuglø, leiðara á tlf. 211478.

Um eingin pedagogur søkir starvið, verður starvið sett við hjálparfólki sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum v.m. skal sendast til:

**Sambýlini á Mýrini**
Att.: Leiðarin
Á Mýrini 4-6
188 Hoyvík

Umsóknarfreist er 20. februar 2006 kl. 12.00.

# Vikarur til Nólsoyar skúla

Søkt verður eftir vikari fyri lærara í sjúkrafarloyvi, frá 15. februar og 3-4 vikur fram.

Nærri fast at vita við at venda sær til skúlaleiðaran tlf. 327033 ella 527119.

**Gunnvør Joensen, skúlaleiðari**
**Nólsoyar Skúli**

# Leiðari

## til Sandoyar Kunningarstovu

Søkt verður eftir leiðara til Sandoyar Kunningarstovu at byrja 1. mars 2006.

Arbeiðið er umleið hálv tíð á skrivstovuni, men leiðarin skal harumframt vera tøkur uttanfyri skrivstovutíð.

Leiðarin er eisini skrivari hjá økisferðavinnufelagnum.
Løn sambært avtalu.

Til starvið krevst góður teldukunnleiki, somuleiðis góður kunnleiki til føroyskt og enskt bæði í talu og skrift.
Av tí at nógv samband er við Ferðaráð, aðrar kunningarstovur, kommunur og veitrarar, eru samstarvsevni sera týdningarmikil.

Tey, ið vilja hava meira at vita um starvið, kunnu venda sær til Lauru Joensen, Skálavík, tlf. 210549.
Freistin at søkja er úti 13. februar 2006.
Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast:

**Sandoyar Kunningarstovu**
210 Sandur



**Fráboðan um marknaseting millum markatalsbygdirnar Kvívík og Vestmanna**

Fyri at staðfesta markið millum bygdirnar frá munnanum á Heljareyga og út um tað økið, Vestmanna kommuna hevur fylt út á sjógv, verður hervið boðað til ástaðarfund hósdagin 16. februar kl. 10.00. Hetta verður gjørt eftir reglunum í kap. E í løgtingslóg nr. 64 frá 11. des. 1962.

Jarðareigarar í báðum bygdum saman við umboðum fyri bygdaráðini og hegnsýningarmonnum verða hervið boðaði at møta á staðnum.

**Matrikulstovan**

# Útróðrarbátur til sølu

Um hóskandi boð fæst verður útróðrarbáturin M/B »Osla«, Norðdepli, hervið lýstur til sølu við øllum rættindum og loyvum, 106 fiskidagar.

**Áhugað kunnu ringja á tlf. 221489 ella 220086**